# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Johannes Ismael Miðberg**
Vestmanna

andaðist mánadagin 2. febr. 2009, 94 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin 4. febr. kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jenny, Thorleif, Hallgrím, Kathrina, Jón, Tova og Jonleyg**

Tey, ið vilja minnast Jóhannes, kunnu lata eina gávu til eldrasambýli í Vestmanna.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkendslu, tá kæri bróðir, svágur og mammu- og pápabeiggi okkara

**Sverre Kruse**
Eiði

andaðist og varð jarðaður.
Ein serlig tøkk til Emil prest og Svenning av Lofti fyri troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Korndalsbýlið, og starvsfólkini á Korndalsbýlinum.
Eisini takka vit teimum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Brynhild og Gunnar Andreasen við familju**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri høgtelskaði

**Rólant Lenvig**
ættaður úr Hesti

andaðist og varð jarðaður.
Takk til tykkum, sum ringdu til hansara og tykkum, sum vitjaðu hann. Takk til tykkum á Landssjúkrahúsinum; tykkara arbeiði lá ikki eftir.
Øll tit mongu, sum komu at fylgja og á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervinum, takka vit hjartaliga.
Takk fyri blómur og kransar. Takk til tín Viggo fyri tann vakra gravsálmin, og til tín Theodor fyri hjálpsemi, tú veitti okkum.
Vegna Meinigheitshúsið takka vit hjartaliga fyri minnisgávuna.
Enn einaferð hjartans tøkk øll somul.

*Vegna familjuna*
**Malan**



*Edmund Jensen*



*Kristin Tórur Bærentsen*

# Sorgardagur

Sunnudagin 7. september andaðist Edmund Jensen av Sandi, sonur Fríðbjørg og Patsy Jensen, brádliga av sjúku. Hann var staddur í Danmark í útbúgvingarørindum. Edmund gjørdist bert 21 ára gamal.

Eina viku seinni 14. september andaðist skyldmaður hansara Kristin Tórur Bærentsen úr Skopun, 27 ára gamal av einum óhappi á lónni á Sandi, har hann var farin at svimja sum froskmaður. Kristin var sonur Sólvá og Sigurd Bærentsen, lærara.

Sigurd Bærentsen andaðist fyri tveimum árum síðani av sjúku, 57 ára gamal, so Kristin er nú fluttur heim til faðir sín. Edmund eigur trý systkin, sum hann kann vera saman við heima hjá Harranum. Sorgardagur. Okkara hjørtu eru sundurbrotin. Vit syrgja og sakna tykkum so ómetaliga nógv.

*»Guds náði okkum ber,*
*tá eingin vón er longur«*

**Vegna familjurnar**
**Sólvá og Fríbjørg**

Hesin sangur, sum Fríðbjørg yrkti til jarðarferðina hjá einum øðrum skopuningi, sum eisini doyði ungur, varð sungin til jarðarferðirnar hjá Edmundi og Kristini.

*Tað stóð eitt træ í mínum lívsins garði*
*við fýra føgrum reyðum rósum á.*
*Nú stendur træið mítt við trimum rósum,*
*tann eina er ei meira trænum á.*

*Ein dag tá Gud sær rósu vildi velja*
*at planta heima í sín rósugarð.*
*Ta fagrastu, ið var, hann vildi finna.*
*Hann hana fann í garðinum hjá mær.*

*Gud hevur tikið mína føgru rósu*
*og planta hana í sín rósugarð.*
*Har skal hon standa trygg í allar ævir,*
*ei nakað hóttir rósu mína har.*

*Mín Gud tú ert mín troyst, eg á teg líti,*
*tó ei eg altíð skilji, tað tú gert.*
*Eg syrgi mína føgru reyðu rósu.*
*Eg skilji ei, hví hon ei meir er her.*

*Men ein dag Guð, tá heim til tín eg komi,*
*tá skal eg skilja alt, sum hendi her.*
*Tá skal eg aftur síggja mína rósu*
*har heima hvar, ið skilnaður ei er.*

*Nú stendur træið mítt við trimum rósum,*
*tann eina blómar í Guds faðirs garð.*
*Har er hon vard mót lívsins ódnarstormum,*
*ei nakað hóttir rósu mína har.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Charles Hauritz**, vanliga nevndur Sallaba, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Esbjerg, andaðist leygardagin 31. januar í Esbjerg, 84 ára gamal.

**Brynjálvur Djurhuus**, vanliga nevndur Binni, ættaður av Sandi, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.

**Jóhannus Miðberg** í Vestmanna andaðist mánadagin, 94 ára gamal. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14 úr Vestmanna kirkju.

**Jústa Vang, Hvalba**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 52 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**80 ára føðingardagur**
9. februar verður Herborg Kjærbech Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin 7. februar kl. 19 í ítrottarhøllini á Trongisvági. Tey ið ynskja at koma, vinaliga ringið á tlf. 371171, innan 2. februar.

**75 ára føðingardagur**
Mikudagin 4 februar verður Hanna Isaksen, fyrrverandi formaður í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag,75 ár.

**70 ára føðingardagar**
70 ára føðingardagarnir hjá Gunnvør og Jefri Justinussen, Tórshavn, verða hildnir í Pálsstovu leygardagin 21. februar kl. 18.00. Tey, ið ætla sær at koma, verða vinarliga biðin um at boða frá á tlf. 313003, 213043 ella 272803 í seinasta lagi sunnudagin 15. februar.

**60 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. februar fyllir Niels L Thomsen, bóndi Innan Glyvur 60 ár. Opið hús verður heima leygardagin 7. februar frá kl. 10 fyrrapartin.